# Løgtingslóg

## um

## tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya

**§ 1.** Áðrenn ella við komu til Føroya skulu ferðandi, sum eru 12 ár ella eldri, í tíðarskeiðnum 1. oktober – 31. desember 2020 rinda eitt avgjald á kr. 312,00. Avgjaldið er frítikið fyri meirvirðisgjald. Heimilað er flutningsfyritøkunum ella umboðum teirra at krevja eitt ómaksgjald fyri ómakin.

**§ 2.** Avgjaldið verður kravt inn av flutningsfyritøkunum ella umboðum teirra. Um ferðaseðilin er seldur, tá henda løgtingslóg kemur í gildi, setir flutningsfyritøkan seg í samband við tann ferðandi til tess at tryggja, at avgjald verður rindað áðrenn ella við komu til Føroyar.
*Stk. 2.* Avgjald, ið er innkravt í einum mánaði, skal verða goldið í seinasta lagi 22. í øðrum mánaðinum eftir. Flutningsfyritøkan skal í seinasta lagi 10. í øðrum mánaðinum eftir senda TAKS uppgerð yvir innkravt avgjald avvarðandi mánað.
*Stk. 3.* Er avgjaldið ikki goldið, tá freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu.
*Stk. 4.* Avgjald og renta, ið eru fallin til gjaldingar, kunnu verða innheintað við panting. TAKS fremur panting fyri avgjøld og rentur, ið eru fallin til gjaldingar eftir hesi løgtingslóg.

**§ 3.** Er avgjald ikki rindað við komu til Føroyar, krevur TAKS avgjaldið inn, um avgjaldið ikki verður kravt inn sbrt. § 2, stk. 1, 1. pkt.

**§ 4.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2020.

Samtykt á Løgtingi hin 29. september 2020 við 26-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 29. september 2020

stjóri

lm. nr. 23/2020